

## Ráðstevna í Norðurlandahúsinum tann 7. juni 2007

# Vónin um framtíðar eldrarøkt.

**Bill Clinton** kemur ikki til Føroyar á hesum sinni
– men tað ger **Bill Thomas**.

Hann fer at halda fyrilestur um "The Eden Alternative", sum gongur sína sigursgongd kring heimin, tá ið tað snýr seg um eldrarøkt og trivnað.

Dr. Bill Thomas starvaðist á røktarheimi og varnaðist har, at trý fyribrigdi plága búfólkini: Einsemi, keðsemi og hjálparloysi. Okkurt betri mundi finnast, helt hann, og legði tí lunnar undir "The Eden Alternative", har bústovnarnir eru fullir av lívi, gleði, anda og samanhaldi. Stutt var millum tanka og verk, og skjótt varð farið undir at fylla bústovnar við húsdjórum, litføgrum lutum, tónleiki og sangi, soleiðis at trivnaðurin batnaði munandi, og lættari varð at vera um tey eldru.

Bill Thomas er altjóða viðurkendur fyri sítt arbeiði innan geriatri og eldrarøkt. William H. Thomas, sum hann eitur, tók læknaprógv á Harward í 1986, í family medicine í 1992 og í geriatri í 1994.
Bill Thomas hevur skrivað fleiri bøkur um evnið, og seinasta bók hansara: "What are old people for? How elders will save the world" varð kosin ársins bók av American Medical Writers Association í 2005.
Bill Thomas er tiltikin góður frásøgumaður.
Jane Verity verður eisini við á ráðstevnuni. Hon er heitur forsprákari fyri "The Eden Alternative", og hevur fleiri ferðir verið í Føroyum og undirvíst og hildið fyrlestur. Hon fer eisini at greiða frá nevnda hugtakinum.
Jane Verity er verji og umboð fyri Eden-verkætlanini í Norðurlondum.
"The Eden Alternative" er so smátt við at vinna fram í Føroyum, og nakrir stovnar leggja dent á at hella seg upp at sjónarmiðunum i Eden-verkætlanini.

Ráðstevnan er serliga ætlað politikarum, leiðarum, starvsfólkum á stovnum, avvarðandi og øðrum, ið varða av og hava áhuga í eldraøkinum, og øðrum bústovnum í Føroyum.

Nærverkið skipar fyri ráðstevnuni, sum verður 7. juni, kl. 09.30 í Norðurlandahúsinum.
Kostnaður 1950 kr.

**Tilmelding fer fram á www.naerverk.fo**
**ella á tel. 30 40 20.**

les meira um The Eden Alternative á
**www.edenalt.com**

**Skrá**

| | |
|---|---|
| **09:00** | Morgunmatur |
| **09:30** | Mary J. í Garði, stjóri fyri Nærverkið, bjóðar vælkomin |
| **09:35** | Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, setur ráðstevnuna |
| **09:45** | Dr. Bill Thomas, serlækni í geriatri – skipan av framtíðareldrarøkt eftir hugtakinum Eden Alternative |
| **10:30** | Stuttur steðgur |
| **10:45** | Dr. Bill Thomas – framhald |
| **11:30** | Haldis Joensen – Eden Alternative á heiminum fyri minnisveik við Vallalíð |
| **12:00** | Døgurði |
| **13:15** | Margaret Johannesen – íverksetan av Eden á Giljagarði, Leirvík |
| **13:45** | Jane Verity – Eden Alternative – ein arbeiðsháttur í eldrarøktini |
| **14:30** | Kaffi |
| **14:50** | Dr. Bill Thomas – skipan av framtíðar eldrarøkt |
| **15:50** | Mary J. í Garði, stjóri, endar |

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo